# Nýtt og gott spildurnýtt

**Knút Háberg Eysturstein við bólki, electronica duoin The Ghost og trubadururin Heiðrikur á Heygum eru á skránni fríggjakvøldið, tá Tónleikasamtakið Grót skipar fyri forvitnisligari konsert í Losjuni í Gøtu**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Grót hevur havt nakrar konsertir seinastu mánaðirnar, har spennandi og fyri tað mesta nýggj føroysk tónleikanøvn hava framført. Komandi fríggjakvøld verður í so máta einki undantak, tí millum nøvnini er m.a forkunnuga electronica duoin The Ghost, ið spældi sína fyrstu konsert fyrr í ár á júst eini Grót konsert í Losjuni. Bólkurin gjørdi vart við seg á Asfalt herfyri við væl eydnaðari framførslu, ið fekk ummælaran hjá Sosialinum, at kalla hetta bestu konsertina á Asfalt.

Tónleikurin er minimalistiskur, rútmiskur og egin; ein samanseting av elektroniskum rútmum og hondspældum gittara og synthesizara. Teir báðir Filip Mortensen og Urbanus Olsen eru The Ghost.

Umframt The Ghost kemur eisini gávuríki havnamaðurin Heiðrikur á Heygum á vitjan í Losjuni. Afturat sær hevur hann Benjamin Petersen á gittar, og Andreas Restorff á cello. Heiðrikur fæst bæði við elektroniskan og akkustiskan tónleik, og fríggjakvøldið verður tað akkustiski parturin, ið verður á skránni. Hann syngur inniliga og vakurt, og her á Sosialinum hava vit áður samanborið Heiðrik við Chris Isac. Heiðrikur syngur egin løg og kompositiónir, og tulkar eisini klassikarar úr føroyska sangskattinum.

Kendasta navnið, ið fer at framføra fríggjakvøldið, er Knút Háberg Eysturstein. Knút gav í 2004 út fløguna "Havsglóð", og nú er arbeiðið farið í gongd við at gera næstu fløguna. Í hesum sambandi er nýggjur bólkur settur á stovn, og teirra fyrsta konsert, einans við nýggjum tilfari, var á ársins Asfalt. Sostatt verður høvi fríggjakvøldið at hoyra nýggjar tónar av komandi útgávuni hjá Knúti og tónleikaligu starvsfeløgunum, umframt at okkurt "Havsglóð" lag kanska stingur upp undan í rúgvuni.Aftrat Knúti á palli eru Bogi á Lakjuni, Hanus Mikal Andreasen, Niels Jákup í Jógvanstovu og Andreas Dalsgaard.

Konsertin er í Losjuni við Gøtugjógv, fríggjakvøldið 22. juni. Dyrnar lata upp kl 21:30.

# Enn ein Kim konsert



*Danska tjóðarskaldið, Kim Larsen, fer at hava tvær konsertir í Norðurlandahúsinum*

At Kim Larsen er ein væl dámdur harri í Føroyum skerst ikki burtur, higartil hevur Norðurlandashúsið selt tvær konsertir við danska sangaranum, báðu ferð eftir fáar tímar. Nú verður roynt aftur við eini triðju og seinastu Kim Larsen konsert.

Hóskvøldið visti portal.fo og planet.fo at siga frá, at Kim Larsen & Kjukken koma til Føroya at hava konsert mikudagin 21. november, og eftir bert fáum tímum vóru øll 800 atgongumerkini seld.

Um miðdagsleitið ígjár vistu vit, at siga at gjørt var av at hava eina eyka konsert í Norðurlandahúsinum dagin eftir upprunaligu konsertina. Eisini henda konsert varð útseld beinanvegin. Sostatt hava higartil 1.600 fólk tryggjað sær atgongd til Kim Larsen. Í samráð við sangaran hevur Norðurlandahúsið nú fingið í lag enn eina konsert, hon verður hildin týskvøldið 20. november kl. 19.30. Niels Halm stjóri í Norðurlandahúsinum er sera glaður um stóra áhugan, men sigur, at hetta tíanverri eisini verður seinasta eykakonsertin, ið til ber at hava við Kim Larsen á hesum sinni.

Atgongumerki eru nú aftur at fáa í Norðurlandahúsinum ella á heimasíðu húsins www.nlh.fo.

**nud**

M A R K N A Ð A R R Á K    V I K A 25 2007

**PARTABRØV HÆKKAÐU AFTUR**
Fyri tveimum vikum síðan var nógv tos um, um partabrøv nú fóru at lækka. Okkara meting í seinasta Marknaðarráki var, at talan her bert var um eina vanliga lítla fyribils lækking. Gongdin hesa farnu vikuna hevur stuðlað okkara sjónarmiði. Partabrøv hækkaðu nevniliga um 2%.

Hendan vikan verður serliga áhugaverd fyri føroyskar íleggjarar. Handilin við Føroya Bankapartabrøvum byrjar hósdagin 21. juni. Nógv bendir á, at skrásetingin er yvirteknað, so kursurin kann væntast at byrja á 189 ella hægri.

**DOLLARIN LÆKKAÐI AFTUR**
Móti endanum av farnu viku lækkaði dollarin úr 5,60 til 5,55 aftaná eina hækking í hálvan annan mánað. Hetta hendi aftaná nøkur misjøvn lyklatøl vóru kunngjørd og marknaðurin valdi at venda eyguni móti lágu prísvakstrartølum úr USA.

Hóast fleiri miseydnaðar roydnir at lækka pundið sum hevur verið støðugt seinastu tveir mánaðarnar, liggur tað framvegis í einum hækkandi langtíðarráki.

Japanska gjaldoyrað heldur á at lækka. Orsøkin er at útlit eru fyri, at japansku renturnar framyvir fara at liggja langt undir teim evropisku. Myndugleikarnir í Japan fylgja støðuni gjølla og siga seg vilja hækka rentuna um tað gerst neyðugt.

**LÁNSBRÆVARENTUR HÆKKA ENN**
Lánsbrævarenturnar hildu á at hækka í farnu viku. 10-ára rentan kom sum einki upp um 4,68%, sum var metið síðan 2003. Nú er 10-ára rentan 4,72%. Í farnu viku var hon uppi í 4,78%, sum er tað hægsta síðan 2002.

**HESA VIKUNA**
Hendan vikan verður væntandi friðarlig á altjóða marknaðunum. Tað koma fá týdningarmikil hagtøl, og marknaðirnir fara tí væntandi at fylgja við m.ø. oljuprísinum.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1455,87 | + 2,29% |
| Alheims partabrøv | 8989,56 | + 1,35% |
| Atlantic Petroleum | 1110,00 | -1,77% |
| KB Trygg Eurostoxx | 111,64 | + 0,56% |
| USD | 554,86 | -0,47% |
| JPY | 4,49 | -2,03% |
| GBP | 1100,41 | + 0,25% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

**Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo**

KAUPTHING BANK